**Síðsti dagur bókað verður á fíggjarárið 2023**

Stovnarnir verða mintir á, at mikudagin 21. februar 2024 er seinasti dagur, ið stovnar kunnu bóka kreditorskjøl á fíggjarárið 2023, og seinasta lønarkoyringin fyri fíggjarárið 2023 verður fríggjadagin 16. februar 2024.

Neyðugt er tí, at lønarskjøl viðvíkjandi fíggjarárinum 2023 at avgreiða eru Gjaldstovuni í hendi í seinasta lagi **fríggjadag 16. februar 2023** og kreditorskjøl viðvíkjandi fíggjarárinum 2023 **fríggjadag 16. februar 2023**. Sama dag verður debitormodulið fyri 20232stongt, so stovnarnir hava møguleika at avgreiða tær rokningar, tey hava móttikið.

Gjaldstovan fer, regluliga, fram til 21. februar 2024 at minna á hesa freist.

Undir ”Ársroknskapurin 2023” liggur t.d. skjalið ”Tíðaravmarkan av útreiðslum í ársroknskapinum 2023”, sum hevur áhuga hjá teimum, sum vita, at ein útreiðsla skal bókast á 2023, men rokningin er ikki stovninum í hendi fyri 16. februar 2024.